H71-VÍF 28-24 (13-13):

# Ferðin var høg í Hoyvík

**Hoyvíkingar megnaðu at halda dampinum allan dystin, og fingu soleiðis tvey sera týðandi stig í stríðnum um at gerast nummar tvey í grundspælinum**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Eftir at teir seinasta umfar bast Kyndli, skuldu vestmenningar sunnudagin av álvara skræða seg leysar í stríðnum um næst ovasta plássið í grundspælinum hjá monnum.

Tað stóð tó greitt, at talan skudli verða um trupla uppgávu. H71 hevur alt árið verið væl fyri, og tó at teir eitt skifti tóktust missa stevið, so fótaðu teir sær við sigrinum á StÍF fyri tveimum vikum síðani.



*Talan var um sera tætta og intensa uppgerð í Hoyvíkarhøllini sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Tróndur og Piti

Og tað eydnaðist eisini hesa ferð hjá H71 at taka bæði stigini.

Talan var frá byrjan um eina rættiliga ferðmikal uppgerð, har kropsligi parturin av spælinum fekk stóra rúmd. Helst eisini tí báðum liðunum dámar væl at halda verjuna flata.

Fyri steðgin var tó leingi líkt til, at VÍF hevðu munin. Teir sluppu kanska ikki heilt frá hoyvíkingunum, men teir tóktust tó hava størri yvirskotið í spælinum. Móti endanum av fyrra hálvleiki fingu gestirnir eisini togað seg tvey mál framum, men teir megnaðu tó ikki at halda fast.

Eftir steðgin var gongdin fyri tað nógva tann sama. VÍF var kanska betra liðið, men við stórspæli frá Tróndi Vatnhamar og Piti Negru megnaðu hoyvíkingarnir tó at hanga í. Somikið væl, at teir eisini megnaðu at seta trumf á, tá hálvleikurin var hálvrunnin. Fýra ferð á rað sat bólturin í VÍF-meskunum og tann munin megnaði VÍF ongantíð at taka aftur. Heldur ikki, hóast eftir eitt time-out rættiliga fingu skil upp á verjuna. Munurin upp til hovýkingarnar var í størra lagi, og móti endanum varð hetta eisini satðfest.

### Kunnu røkka oddinum

Við sigrinum staðfestu hoyvíkingarnir, at tað nú eru teir, sum skulu roknast sum fremstu kappingarneytarnir hjá Kyndli. Teir vinna seg ájavnt teimum grønu, áðrenn grundspælið er av. Fyrst og fremst, so krevur tað tó, at talan verður um sigur, tá H71 spælir móti KÍF næsta vikuskifti.

Hjá VÍF var talan um lítið afturstig, nú teir annars veruliga tóktust hava fótað sær. Men samstundis leggur tapið eisini stórt trýst á meistararnar undan seinasta dystinum í grundspælinum. Munurin upp til Kyndil er nú fimm stig, og hóast hann minkar, tá farast skal undir endaspælið, so eru ikki ráð at geva stórt meira enn tað sama burtur.

## FAKTA UM DYSTIN

**H71-VÍF 28-24 (13-13)**
**Málskjúttar**
**H71:** Piti Negru 9. Tróndur Vatnhamar 9(1), Jakob Jónsson 4, Niels Viggo Niclassen 3, Johnny Durhuus 2, Ólavur Brimnes 1
**Kyndil:** Agnar Joensen 6, Regin Joensen 5, Harald Bjørgvin 3, Áki G. Olsen 3, Jákup S. Andreasen 3(2), Sámal Joensen 2, John Zachariassen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Brotskøst:** H71 1, VÍF 2
**Útvísingar:** H71 2, VÍF 7
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

Kyndil-Neistin 13-34 (7-11):

# Kyndil fall saman

**Úr 7-8 broyttist støðan til 7-26, tá Kyndil smokkaði fullkomuliga saman í grannaupgerðini**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tey flestu høvdu roknað við einum spennandi dysti, tá kvinnuliðini hjá Kyndli og Neistanum hittust sunnudagin.

Kyndil hevur staðið seg rættiliga væl higartil í ár, og tó at tær vóru skerdar, nú Lina Andriulyta var sjúk, so tóktust tær at hava eitt sera gott tak á grannunum fyrstu løtuna.

At Neista-liðið so eisini varð skert longu fyri steðgin, tá fyrst Annika Ljósstein noyddist at gevast við brotnum fingri, og Mildrið Jacobsen síðani noyddist á sjúkrahúsið við heilaskjálvta gjørdi ikki fortreytirnar hjá teimum grønu verri.



*Fyri tað nógva fekk Neistin sera gott rúm í Kyndils-verjuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Mistu alt á gólvið

Men júst um saman mundi fór av álvara at ganga skeiva vegin hjá Kyndli. Seinastu fimm minuttirnar fyri steðgin megnaði Neistin at skræða seg frá Kyndli, og tá Kyndil so eftir steðgin skuldi vinna hetta aftur, gekk heilt galið.

Snøgt sagt, so vildi mest sum einki rigga hjá teimum grønu. Neistin fekk alt fyri eitt tvey-tr‡ skjót mál, og so fall alt saman. Í álopspartinum mest sum kappaðust Kyndils-kvinnurnar um at fremja mistøk, sum náðisleyst vórðu revsað av teimum bláu. Og tá tær so loksins komu til nakrar upplagdar møguleikar, stóð Fríða Petersen sum ein livandi múrur fyri teimum.

Úrslitið av øllum hesum varð, at Kyndil ikki kom upp á 8 mál, fyrr enn góðir 19 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. Bert níggju minuttir fyri steðgin hevði støðan anarrs 7-8, men eftir hesar 28 málleysu minuttirnar, stóð ikki minni enn 7-26 til Neistan, hvørs júst Stjørnan kemur á vitjan næsta vikuskifti.

Kyndil skal hinvegin taka sær annað skinn um bak, um tær skulu gera sær nakrar skreytir, tá tær væntandi eru partur av FM-endaspælinum í vár. Sjálvandi var saknur í Linu hesaferð, men eitt slíkt samanfall eigur ikki at koma fyri hjá liði, sum tykist hava ætlanir um at amast móti oddinum í ársins útgávu av Sunset-kappingini.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-Neistin 13-34 (7-11)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Hildur Høghamar 3, Jórun S. Ludvík 2(1), Súsanna Petersen 2, Anja Heinadóttir 2, Ronja M. Mikkelsen 2(2), Linda Weihe 1
**Neistin:** Unn Kragesteen 7(1), Ása á Neystabø 6(1), Nicoleta Radu Hansen 6, Anna Clementsen 4, Rakul Augustinussen 4(1), Annika Ljósstein 3, Gunnvá Brockie 2, Kára á Dunga 1, Annika Thomsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, Neistin 8
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 2
**Dómarar:** Petur S. Dahl & Hallur Danielsen

Tjaldur-VB 29-35 (7-19):

# Málveitsla í Runavík

**VB avgjørdi alt fyri steðgin, tá tær saman við Tjaldri hildu sanna málveitslu í Runavík**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

VB syrgdi fyri, at talan varð um fulla úrtøku hetta vikuskiftið, tá tað eisini eydnaðist at fáa øll stigini við sær úr Runavík sunnudagin.

Einki er at taka seg aftur í, at talan á pappírinum mest sum var um avgreiðsluspurning, og serliga fyri steðgin var hetta eisini sjónligt. VB sat á mest sum øllum, og fáu áskoðararnir í høllini mundu einamest hugsa um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Eftir steðgin gekk tó ikki heilt so væl. Sigurin var longu púrasta vísur, og tí kundu meistararnir eisini taka sær meira av løttum. Tjaldur slapp eisini somikið væl við í dystin, at tær fingu minkað nakað um munin.

Men framvegis var tað VB, sum hevði væl fleiri mál á talvuni, tá dómararnir høvdu bríkslað fyri seinastu ferð, og so eru tær aftur av álvara heilt nær oddaliðunum báðum.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-VB 29-35 (7-19)**
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Maya Hecimovic 11(2), Beinta Joensen 10, Elinbjørg Hammer 3, Mona Langgaard 3, Jasmon Devovic 2
**VB:** Daiva Toumaite 15(1), Christina Holm 8, Svava Vestergaard 6, Laila Jespersen 3, Asta Armonaviciute 1, Margreth Augustinussen 1, Miriam Michelsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 2, VB 1
**Útvísingar:** Tjaldur 3, VB 1
**Dómarar:** Kartin Joensen & Kristian Joensen